## Bæði taptu við sjey málum

Norska felagið Start, sum Todi Jónsson áður hevur umboðað, tapti leygardagin heili 8-1 í landskappingardysti móti Molde. Sunnudagin tapti KÍ, núverandi felagið og barndómsfelagið hjá Toda Jónsson, heili 7-0 á útivølli móti EB/Streymi. Tí hava tvey lið, sum hann er og hevur verið knýttur at, tapt við sjey málum um vikuskiftið. Fyrrverandi landsliðsframherjin hevur einans hugt at, tí hann hevur í løtuni skaða at dragast við.



## Magnus aftur í Kyndli

Magnus Matras skal ætlandi verja málið hjá Kyndli í komandi kappingarári. Tað skrivar heimasíðan hjá Neistanum. 21 ára gamli Magnus Matras, sum er uppvaksin í Neistanum, hevur áður spælt tvey ár í grøna høvuðstaðarfelagnum. Í fjør kom málverjin aftur til Neistan, men nú skiftir hann aftur til grannarnar.

# Heildaravrikið var nøktandi

**Føroysku svimjararnir, sum tóku lut í heimsmeistarakappingini í Rom, settu í alt sjey nýggj føroysk met. Tí vóru úrslitini á góðari leið, hóast stjørnan í føroyska hópinum ikki stóð seg serliga væl**

SVIMJING
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Føroysk svimjing fekk í seinastu viku sjey nýggj met. Sheila Millum Garðarnar, Kári á Høvdanum og Birita Debes svumu øll sína bestu tíð á ymsu teinum, tá tey tóku lut í heimsmeistarakappingini í Rom. Úrslit, sum heilt víst eru flott og nøktandi. Tí er føroyska ferðalagi, sum nú aftur vendir nøsini móti Føroyum, væl nøgd. Eisini hóast, at Pál Joensen, sum var stóra navnið í hópinum, ikki stóð seg serliga væl.

### Langt frá oddanum

Hóast føroyingarnir stóðu seg væl í føroyskum svimjihøpi varð somuleiðis staðfest, at framvegis restar nógv í, áðrenn vit røkka altjóða tindunum. Men føroysk svimjing hevur sett sær stór mál, og hevur seinastu árini tikið risa fet móti oddanum. Um framgongdin heldur fram, eru líkindi sera góð fyri at bjóða teimum stóru av um nøkur ár.

### Debes var eyðsýnd

13 ára gamla Birita Debes hevur seinastu vikuna verið í støðugari framgongd. Hon setti tvey nýggj juniormet, og bøtti um fleiri av sínum tíðum. Har við prógvaði hon sína støðu í føroyska svimjiheiminum. Við úrslitunum er hon skýrd eina bjarta framtíð, og Birita Debes verður væntandi eitt navn, vit fara at hoyra meira til.

Somuleiðis setti Sheila Millum Garðarnar og Kári á Høvdanum ávikavist trý og tvey nýggj met. Úrslit, sum svimjararnir eiga stórt rós fyri.

Ljóssøgurnar vóru fleiri í Rom. Pál Joensen stendur í skugganum av frálíku úrslitunum. Føroysk svimjing eigur at vera errin av sínum svimjarum, hóast alt ikki eydnaðist, sum tað skuldi.

**Sheila Millum Garðarnar setti trý nýggj føroysk met í farnu viku**



### Tey sjey metini

| | | |
|---|---|---|
| Sheila Millum Garðarnar | 100 metrar firvald | 1:08,17 |
| Sheila Millum Garðarnar | 100 metrar frí | 0:59,63 |
| Sheila Millum Garðarnar | 50 metrar frí | 0:29,56 |
| Kári á Høvdanum | 50 metrar firvald | 0:26,03 |
| Kári á Høvdanum | 50 metrar rygg | 0:27,65 |
| Birita Debes | 100 metrar frí, juniormet | 1:10,30 |
| Birita Debes | 50 metrar frí, juniormet | 0:27,93 |

# Pál var eitt vónbrot

**Pál Joensen var ikki sannførandi í sínum avrikum undir heimsmeistarakappingini í Rom. Tað eydnaðist ikki suðuroyinginum at reisa seg eftir vónbrotið í 800 metrar frí týsdagin, tá hann royndi seg á 1500 metrar teininum leygardagin**

SVIMJING
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Tað eydnaðist mær ikki, sum eg ætlaði. Hetta var ein fiasko.

Soleiðis tók Pál Joensen saman um í Kringvarpinum eftir HM-kappingina í Rom. Vágbingurin gjørdi lítið um seg í svimjihylunum í italienska høvuðsstaðunum, og hann er týðiliga vónbrotin um úrslitið. Hvørki í 800 metrum frí ella á 1500 metrar teininum gjørdi hann um seg, og har við varð staðfest, at hann ikki er í toppformi.

### 20 sekund seinni

Leygardagin kom Pál Joensen á málið sum nummar 17 av 43 svimjarum í innleiðandi kappingini á 1500 metrar teininum. Tíðin var 15:21,37, og tað var ikki nøktandi. Tilmeldingar tíð hansara var 15:02,80, og tí er sjálvsagt, at vónbrotið var stórt.

Pál Joensen var væl við fyrstu 400 metrarnar, men síðan byrjaði hann at dragna. Fyrstur á málið var Sun Yang úr Kina við tíðini 14:54,54.

Tá avtornaði varð greitt, at kravtíðin til pláss í finaluni var 15:00.70.





**Pál Joensen slapp ikki at smakka gull í heimsmeistarakappingini í síðstu viku**

### Darvaður av sjúku

Pál Joensen var í seinastu viku eisini darvaður av sjúku, sum eisini hevði sína ávirkan á laku úrslitini. Seinnapartin fríggjadagin varð greitt, at hann fór at svimja á 1500 metrar teininum leygardagin. Tað skal sjálvsagt eisini havast í huga.

### Reisast aftur

Pál Joensen skal í desember royna seg í EM á stuttbana. Vágbingurin fer nú at venja miðvíst fram kappingini, og tá er uppgávan fyrst og fremst at reisast aftur. Ítróttarfólk skulu í mótgongd av álvara standa sína roynd, sum oftast er munurin á gleði og tári. At tú mentalt er fyrireikaður at standa seg, hóast tað ikki gongur eftir vild.

Pál Joensen stóð ikki royndina hesaferð. Men eingin stendur royndina hvørjaferð. Og tí er lítið at ivast í, at vágbingurin skjótt fer at svimja seg á tindarnar aftur.